# Verður verkfall hjá SEV má løgtingið leggja uppí

**Verður landið myrkalagt av verkfalli í SEV, er ongin ivi um, at politisk stig mugu takast fyri at steðga tí, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum**

ORKUVEITING
*Áki Bertholdsen*

– Fer eitt verkfall hjá SEV at leggja landið myrkt, er ongin ivi um, at Løgtingið fer at leggja uppí.

Bjarni Djurholm er landsstýrismaður í vinnumálum og hann heldur, at tað er óhugsandi, at politiski myndurgleikin fer at seta seg afturá, skuldi tað hent, at streymurin verður slitin av tí, at maskinmeistararnir hjá SEV fara í verkfall.

Men tað kann gerast veruleikin longu um nakrar heilt fáar dagar, tá ið maskinmeistararnir hjá SEV skulu hava løn næstu ferð.


*Kemur tað hartil, at maskinmeistararnir hjá SEV fara í verkfall, so at landið verður myrkalagt, er tað óhugsandi, at Løgtingið ikki leggur uppí, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

Maskinmeistararnir og SEV hava nýliga gjørt nýggjan sáttmála. Men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil ikki sáttmálan, tí hann heldur, at lønarhækkingin upp á 11% tey bæði næstu árini er ov høg. SEV hevur sostatt boðað frá, at lønin næstu ferð verður útgoldin eftir gamla sáttmálanum. Maskinmeistararnir siga, at hendir tað, er tað at meta sum um at sáttmálaloysi er og tá hava menninir rætt at fara til hús.

Tað er eisini fráboðað at fara maskinmeistararnir til hús, verða motorarnir hjá SEV sløktir samstundis, tí teir kunnu ikki ganga mannleysir.

### Politisk stig verða tikin

Vit hava spurt landsstýrismannin í vinnumálum um landsins stjórn kann liva við, at landið verður myrkalagt.

Og tað kann landsins stjórn ikki.

Bjarni Djurholm ásannar, at við ongum streymi er heilt einfalt heldur onki samfelag. Tað er ongin orsøk at kjakast longi um tað.

Men hann sigur, at hann hevur lagt sær tað í geyma, sum maskinmeistarafelagið hevur sagt. Og tað er, at í løtuni er ikki ætlanin at fara í verkfall.

Hann vónar tí, at ósemjan er loyst, tá íð lønin skal gjaldast aftur. Og tað er ikki óhugsandi, tí tá kann støðan á arbeiðsmarknaðinum verða munandi øðrvísi enn hon er nú.

Men samstundis leggur hann dent á, at skuldi tað komið hartil, at landið verður myrkalagt, er tað trupult at ímynda sær, at landsins myndugleikar fara at lata tað fara afturvið borðinum, at Føroyar verða sløktar.

– Tað kann ikki góðtakast, at landið verður sløkt og tí er onki at ivast í, at Løgtingið verður kallað saman at viðgera støðuna. So fáa vit at síggja, um meirilutin fæst fyri at seta ein sáttmála í gildi við lóg, so at endi fæst á einum slíkum verkfalli beinanvegin.

Men Bjarni Djurholm leggur eisini dent á, at hetta er fyri hansara egnu rokning, tí málið er ikki umrøtt politiskt.

### Óvist hvussu tað skal gerast

Hann veit ikki, hvussu ein politisk loysn hevði verið, skuldi tað komið har til.

– Støðan er tann, at SEV og Maskinmeistarafelagið hava samráðst seg fram til ein sáttmála og tí er støðan eitt sindur serlig.

– Her er ikki eitt semingsuppskot, sum skal taka støðu til og spurningurin er so, hvat løgtingið skuldi samtykt, kemur tað hartil.

Bjarni Djurholm heldur avgjørt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at hava fullan og óskerdan rætt til at skipa síni viðurskifti, eisini sáttmálaviðurskiftini og tað eigur avgjørt bara at vera heilt í heilt serligum førum, at politiski myndugleikin leggur seg út í tey viðurskiftini.

– Tí hevði tað verið ein ógvuliga trupul støða hjá løgtinginum at komið í at samtykt eina lóg, sum gjørdi sáttmálan verri enn tann, sum maskinmeistararnir og SEV hava samráðst seg fram til.

Bjarni Djurholm heldur tí, at hetta hevði verið eitt sera trupult mál hjá løgtinginum at tikið støðu til og sjálvur vil hann ikki geva eitt boð uppá, hvvussu ein loysn skuldi verið.

– Hvat SEV viðvíkur, hevur tað higartil altíð verið heilt óhugsandi, at eitt verkfall kundi koma upp á tal. Eg haldi, at partarnir hava verið sera samfelagssinnaðir og eitt verkfall á hesum øki hevur verið heilt óhugsandi.

Men nú er tað óhugsandi ikki heilt so óhugsandi longur.

Annars vísir Bjarni Djurholm á, at eftir lógini skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum góðkenna sáttmálan ímillum maskinmeistararnar og SEV.

– Men spurningurin er, hvussu langt inn í politisku skipanina, sáttmálaviðurskifti á arbeiðsmarknaðinum skulu koma.

– Eg haldi, at politiska skipanin skal halda seg burtur frá sáttmálaviðurskiftunum og letur arbeiðsmarknaðurin avgreiða hasi viðurskiftini í friði. Og so mugu vit hava tað álit á pørtunum, at teir eisini vísa tað neyðuga samfelagssinnið, sigur Bjarni Djurholm.

# Búskaparfrøðingur um samráðingar: Skattalætti førir til hægri lønarkrøv

**– Tað er skeivt, tá ið sagt verður at skattalættar eiga at føra til lægri lønarkrøv. Tvørturímóti føra teir við sær, at lønarkrøvini økjast, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

– Skattalættin, sum Løgtingið hevur samtykt, førir ikki til at lønarkrøvini verða linari.

Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, sigur, at tað er beinleiðis skeivt, tá ið Karsten Hansen tvíheldur um, at skattalættin, sum nú er latin, eigur at føra til, at fakfeløgini skulu halda aftur í lønarkrøvunum.

– Tað eru ógvuliga fáir búskaparfrøðingar í øðrum londum, sum halda, at skattalættin hevur nakran sum helst týdning fyri lønarkrøvini, so at tey verða lægri.


*– Lønarkrøvini, sum nú eru sett fram, eru ein heilt natúrlig avleiðing av støðuni á arbeiðsmarknaðinum. Skattalættin er við til at leggja trýst á búskapin so at lønarkrøvini herðast, ístaðin fyri at linka, sum endamálið var, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur*

Tvørturímóti er veruleikin, at skattalættin ger, at lønarkrøvini verða enn hægri.

– Tað kemur av tí, at skattalættin førir til, at økt trýst verður lagt á búskapin.

Magni Laksáfoss sigur, at tá ið skatturin verður lækkaður, verður meiri til nýtslu og tað førir eisini til økt forbrúk.

– Tað førir so aftur við sær, at byggivirksemið økist, at fólk keypa fleiri bilar, keypa meiri klæðir og ferðast meiri enn tey plaga. Sostatt krevjast fleiri handverkarar, samstundis sum bilasølurnar, klædnahandlarnir og ferðaskrivstovurnar noyðast set seta meiri fólk í starv - sum so aftur hava meiri til nýtslu o.s.fr.

– Sostatt er avleiðingin av skattalættanum tann, at enn meiri virksemi verður í samfelagnum. Skattalættar seta gongd á búskapin og tískil verður eisini brúk fyri meiri arbeiðsmegi. Og tá ið tørvurin á arbeiðsmegi økist, førir tað eisini til størri trýst á arbeiðsmarknaðin og tí førir tað til hægri løn.

Búskaparfrøðingurin sigur nevniliga, at arbeiðsmarknaðurin er ikki øðrvísi enn allur annar marknaður. Tað merkir, at tað er spurningurin um útboð og eftirspurning, sum avgera prísin. Størri trotið er á arbeiðsmegi, tess meiri kostar hon. Størri arbeiðsloysið er, tess minni krevja fólk í løn fyri at fáa arbeiði.

Hann sigur, at støðan í kreppuni í nítiárunum er eitt gott dømi um tað, tí tá hækkaði lønin als ikki í nøkur ár, tá ið arbeiðsloysið var størst.

*Framhald á síðu 9*



# Leysligir tankar um rundkoyring

**Tórshavnar kommuna ger sær í hesum døgum nakrar tankar um, hvussu býurin í framtíðini skal síggja út**

TÒRSHAVN
*Heri á Rógvi*

Nógv hvukku kanska við, tá Útvarp Føroya bar tíðindini um, at ein rundkoyring skuldi gerast við Eystaru bryggju – við Havnargøtu og Skansan.

Rundkoyringin kemur kortini ikki í morgin, men tað kann væl henda seg, at hendan kemur einaferð í framtíðini.

Formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar býráð, Heðin Mortensen, sigur, at kommunan í løtuni ger sær nakrar leysar tankar um, hvussu økið skal síggja út í framtíðini.


*Tað er á hesum økinum, at tosað verður at gera eina stóra rundkoyring fyri hesar báðar smærru. Men talan er bert um tankar higartil*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

– Málið er als ikki viðgjørt politiskt, og tað eru bert tankar í løtuni. Tað kunnu lætt koma misskiljingar í, tá tílíkt kemur fram ov tíðliga, sigur Heðin Mortensen.

Aðalmálið við tankanum hjá kommununi er at skapa meira lív í býin og betri at skipa ferðsluna.

Skal ein nýggj stór rundkoyring gerast, so fer hetta eisini at merkja nakrar broytingar í landslagnum.

– Verður nakað gjørt, so fáa fólkini, ið tað fer at raka, at vita tað fyrst og í góðari tíð, sigur Heðin Mortensen.

### Næstu 25 árini

Hóast Heðin Mortensen ikki kann siga tað heilt nógvu um teir leysu tankarnar í við Eystaru bryggju, so arbeiðir býráðið í Havn við einari ætlan um, hvussu Havnin og Suðurstreymoy skulu síggja út komandi 25 árini.

– Tað er neyðugt at gera eina langtíðarætlan úr Kollafirði til Kirkjubø, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at tað eru byggideildin hjá Tórshavnar kommunu saman við einari arkitekta fyritøku í Danmark, sum saman við Byggi og býarskipanarnevndini hava arbeitt við hesari ætlanini.

– Til dømis hava vit ikki meira byggilendi til eini 25-30 ár. Hetta ger, at vit eisini verða noydd at hugsa øðrvísi, sigur Heðin Mortensen.

Ætlanin verður ikki so langa tíð borin út í hvørt hús, har borgararnir fáa møguleikan at gera viðmerkingar, sigur Heðin Mortensen.

# Vatn sum søluvøra

**Vatn er ikki bara vatn. Sum so nógv annað riggar best at selja tað í fløskum**

VATN
*Heri á Rógvi*

Í nógvar mátar eru vit í Føroyum modernaði. Tað, sum ger seg galdandi uttanlands, ger seg alofta eisini galdandi í Føroyum.

Soleiðis er tað kanska eisini við drykkimentanini. Tosað verður dúgliga um hetta, og tað eru mest bryggjaríini, ið hava sett hetta á skránna. Talan er sum oftast um øl og rúsdrekka, men eisini meira ella minni púra vanligt vatn vinnur fram.

Hóast vit í Føroyum eiga kanska heimins reinasta vant, er tað eisini hjá okkum spennandi at drekka vatn úr fløsku.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvat verður koyrt í fløskurnar av brúsi ella møguliga eitt sindur av smakki.

Men rávøran er framvegis púra vanligt vatn.

Fleiri handlar, ið Sosialurin hevur tosað við, siga, at tey fólk keypa støðugt meira vatn. Tað eru fólk í ógvuliga blandaðum aldri, siga fleiri, men aðrir handlar siga seg selja mest til yngri kvinnur.

Og vatn eru jú sunnari enn brús og sukur.


*Tað er inn at drekka vatn – vatn í fløsku. Føroyingar dáma væl at drekka vatn í fløsku heldur enn úr krananum*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

### Vanligt

Bæði Føroya Bjór og Restorffs hava í nógv ár selt Apolnaris og Club Soda. Men fyri nøkrum vikum síðani kom Føroya Bjór á marknaðin við einum nýggjum produkti, sum heilt einfalt verður rópt fyri Vatn.

Og tað er vatn í orðsins rætta týdningi. Gott vatn úr Klaksvík og eitt vet av kolsýru í 0,5 litur fløskum.

Stjórin í Føroya Bjór, Einar Waag, sigur, at Føroya Bjór vildi útbyggja sítt úrval, og tað er ein sannroynd, at vatn í øðrum londum og partvíst eisini í Føroyum er væl umtókt.

– Vit halda eisini, at tað føroyska vatnið er nakað serligt, og vit vilja fegin bjóða tað út – ikki minst til ferðafólk, sigur Einar Waag.

Føroyskt vatn hevur fyrr verið frammi sum eitt møguligt produkt til útflutning, og hetta er eisini nakað, Einar Waag kundi hugsað sær at gjørt, men tað er ikki bara sum at siga tað, at koma á eitt nú danska marknaðin.

– Men rávøran er góð nokk, sigur Einar Waag.

Frá Føroya Bjór frætti vit, at fólk higartil hava tikið væl ímóti nýggja vatninum.

### Mest í Suðuroy

Petur Zachariasen tekur sær av søluni av vatni fyri Poul Hansen heilsølu. Tey eru umboð fyri Carlsberg, sum selir ymisk produktir við vatni umframt sodavatn.

Petur upplýsir, at tey hava roynt seg við vatni við brúsi og eru síðani komin við fløskum, har næstan einki brús er í.

Seinasta skríggj hjá Poul Hansen er Evian vatn. Hetta slagið av vatni er kent um allan heim. Eins og fleiri onnur av produktunum hjá Carlsberg í Danmark, er talan um kelduvatn. Hetta slagið er úr fransku alpunum, verður sagt. Evian verður í Føroyum selt uttan brús.

Við teimum royndum, Poul Hansen hevur gjørt, merkist, at føroyingar eru farnir at drekka vatn úr fløsku.

Petur Zachariassen sigur, at talan er ikki um nakra heilt stóra sølu, men tað hevur vundið upp á seg.

– Tað vísir seg, at fólk gjarna vilja drekka vatn úr fløsku. Tað er ikki tann stóri munurin frá vatni í krananum, men fólk vilja helst hava tað í fløsku, sigur Petur Zachariassen.

Sølan gongur best í Havn, og tað vísir ein tendensur uttanlands eisini, at sølan gongur best í stóru býunum.

Men sæð í mun til fólkatal, so eru suðuroyingar raskastir at keypa vatn, sigur Petur. Tað er ikki gott at vita, hvat hetta skyldast.

Og fylgja føroyingar gongdini aðrastaðni, so verður drukkið enn meira vatn og minni brús og sukur.

# Ragnar úr starvi

*Ragnar Magnussen hevur verið stjóri á Handilsskúlanum seinastu 15 árini.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



Stutt fyri evstamark kom tíðindaskriv frá Føroya Handilsskúla, har sagt varð frá, at skúlastjórin Ragnar Magnussen av egnum áðum fer frá sum skúlastjóri 1. september 2003.

– Eg haldi, at eg havi verið nóg leingi, sigur Ragnar Magnussen.

Hann hevur verið stjóri síðani 1986. Àðrenn tað var hann inspektørur frá 1983.